Altjóða gjøgnumbrotið hjá The Dreams bíðar fyri framman



# Týskarar berjast um The Dreams

**Føroyski punkbólkurin í Danmark, The Dreams, leggur í løtuni seinastu hondina á nýggju fløguna, sum kemur út í heyst. Ein útgáva, sum fer at sparka teir út um danska markið. Men á Vágsbøi hóskvøldið kunnu áhoyrararnir vænta eina konsert við øllum tí, sum tey kenna, sigur Hans Edward Andreasen, sangari**

Í eini kjallaraíbúð í Klaksvík situr Hans Edward Andreasen framman fyri vindeyganum. Ein havnarmaður, sum er komin til Klaksvíkar at halda frí saman við verfamiljuni. Frí, áðrenn hann og bólkur hansara skulu á pallin á Summarfestivalinum.

Seinastu tvey árini hevur bólkurin spælt 90 konsertir, so talan verður ikki um nakran óroyndan live-bólk, tá the Dreams fara at spæla Backstabber, La' mig være og onnur kend løg á konsertini.

- Áhoyrararnir kunnu vænta at hoyra alt tað, sum tey kenna, sigur Hans Edward avgjørdur.

## Nýggj fløga

Hóast bólkurin er komin væl áleiðis við nýggjari fløgu, verður onki nýtt lag á skránni á konsertini. Tað er tí, at teir hava avgjørt, at ongin ábending um, hvussu tann nýggja fløgan fer at verða, skal koma, fyrr enn fløgan er komin út á marknaðin.

- Talan er faktiskt um eitt nýtt konsept, sum vit hava ment, greiðir Hans Edward frá og tekur svarta keppin av høvdinum eina løtu. Hann er í svartari hettutroyggju, har tað stendur Dreamers á við teirra eyðkendu skrift. Á keppinum stendur punk-basic.

Hann greiðir frá nýggju fløguni og fjalir ikki útyvir, at hann er sera spentur uppá, hvussu teir mongu fjeppararnir fara at reagera, tá teir hoyra hana. Tí sum skilst er talan um eitt sindur av einum stílskifti.

- Eg vænti, at fleiri verða bilsin. Summi verða kanska ónøgd, men tað má man bara taka við, sigur Hans Edward uttan at avdúka nakað ítøkiligt frá fløguni. Skálkabrosið liggur á varrunum, og tað avdúkar spenningin.

## Plátufeløg berjast um bólkin

The Dreams hava nú spælt á øllum tónleikafestivalunum í Danmark – uttan Roskilde.

- Tað eru vit ov lítlir til enn, so um vit vórðu bidnir, høvdu vit sagt nei, sigur Hans Edward.

Men nógv bendir á, at tíðin er komin, at bólkurin er við at vaksa seg nóg stóran til evropiska marknaðin. Í øllum førum eru fleiri verkætlanir í gongd - eitt nú í Fraklandi og Týsklandi.

- Trý tey størstu plátufeløgini berjast um okkum júst nú, sigur Hans Edward ikki sørt errin. Tað merkir, at hesi trý feløgini í løtuni kappast um at koma við besta tilboðnum til bólkin, sum skjótt er fløguaktuellur aftur.

Í Fraklandi arbeiða fólk hart fyri at marknaðarføra bólkin, og tað arbeiðið gongur heilt væl, sambært Hans Edwardi. Men hetta fer ikki upp um høvdið á teimum fýra í bólkinum. Teir eru realistiskir og taka tað róligt.

- Vit eru føroyingar, so tað liggur helst í okkum ikki at leypa framav. Beinini eru plantað væl niðri á jørðini enn, sigur Hans Edward.

## Fastir gestir á Summarfestivalinum

The Dreams hava spælt á Summarfestivalinum á hvørjum ári. Hans Edward greiðir frá, at teir plaga at hittast heima hjá verforeldrunum. Har hugna teir sær og gera seg klárar til konsertina. Teir skulu latast í, sminkast og hárið skal sjálvsagt eisini setast. Tað er unnustan hjá Hans Edwardi, Jórun, sum tekur sær av tí partinum. Hon er frisørur og make-up artistur.

Men fyri sangaran sjálvan hevur tað mest at siga, at hann fær ein blund, áðrenn konsertina.

- Eg plagi at leggja meg áðrenn, tað má eg. Og so biði eg tey vakja meg tíggju minuttir, áðrenn vit skulu avstað, sigur hann flennandi og leggur so afturat, at hinir plaga at øsa seg í felag fyri at verða uppgiraðir til konsertina. Men at talan vanliga er um ein nývaknan Hans Edward á pallinum, hevur ongantíð merkt framførsluna tann skeiva vegin.

The Dreams fara beint frá pallinum á Summarfestivalinum hóskvøld til Danmarkar, har teir skulu spæla á Skanderborgfestivalinum fríggjadagin. Síðani heldur arbeiðið við fløguni fram. Millum annað skulu teir gera eitt videolag.